# Semja undirskrivað við handverkarafeløgini

**Fríggjadagin skrivaðu Føroya Handverksmeistarafelag og bæði handverkarafeløgini undir semju um nýggjan tvey ára sáttmála. Semjan er á sama støði sum semjan við arbeiðarafeløgini við einum útreiðslukarmi á 2,4%**

SAMRÁÐINGAR

Føroya Handverksmeistarafelag hevur, saman við Føroya Arbeiðsgevarafelag, sáttmálar um handverkarar- og serarbeiðarar við tey bæði feløgini Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkarana. Verandi sáttmáli millum partarnar var uppsagdur og gekk út tann 1.oktober 2005, skrivar Vinnuhúsið.

Partarnir hava samráðst síðan 19. september, tó so at nøkur mál eru viðgjørd leypandi gjøgnum sáttmálaskeiðið. Og fríggjadagin 30. september kl. 17.30 var semja undirskrivað millum partarnar um nýggjan tvey ára sáttmála.

Í sáttmálaskeiðinum hækkar eftirlønin 3%. Eitt prosent kemur omaná eftirlønina 1. oktober í ár og tvey prosent 1. oktober næsta ár. Hetta svarar til ein útreiðslukarm á 2,4% yvir 2 ár.

Av øðrum innihaldi í semjuni kann nevnast at:

- semja er um at seta í verk serligan sáttmála fyri lærlingar
- handverkarar skulu framyvir hava setanarskriv, har setanarviðurskiftir vera staðfest
- uppsagnartíðin er longd í sáttmálanum fyri tímaløntar og stytt í fastlønarsáttmálanum
- lønarútgjalding kann fara fram fyri ein mánaða í senn, eftir góðkenning frá fakfeløgunum
- gjaldið sum higartil er farið til halgidagsgrunn framyvir fer til eftirløn.

Nýggja semjan fyri handverksøkið er í kostnaði á sama støði, sum semjan við arbeiðarafeløgini í vár.

# Kristiliga Sangkórið venur aftur

KÓRSANGUR

Týskvøldið 18. oktober fer Kristiliga Sangkórið aftur undir regluligu venjingarnar. Kórið venur enn sum áður í KFUM í Havn.

Eini 35 fólk eru í kórinum, men sangkórið sigur, at nýggir limir eru hjartaliga vælkomnir.

Ein fastur táttur í vetrarskránni hjá kórinum er jólagudstænastan í Havnar Kirkju, og farið verður undir at venja eina jólaskrá til hetta høvi.

**el**

# Umskipan av Barsilsskipanini kostar vinnuni

**Landsstýrið hevur í sambandi við fíggjarlógararbeiðið avgjørt, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum einsamallir skulu fíggja Barsilsskipanina. Afturfyri verður persónsskatturin og partafelagsskatturin lækkaður. –Hetta merkir eykakostnað fyri vinnuna og hetta verður gjørt, uttan at partarnir á arbeiðsmarknaðinum eru hoyrdir, skrivar Vinnuhúsið**

FÍGGJARLÓG

– Bæði undanfarna og hetta landsstýrið hava higartil hildið fast við, at tað er óheppið við »hálvalmennum« stovnum, sum t. d. ALS, og at hesir ikki eru í trá við stýrisskipanarlógina. Nú sær tað tó út til, at hetta passar inn í fíggjarlógararbeiðið, og er nú einki í vegin fyri, at enn ein skipan verður løgd til partarnar á arbeiðsmarknaðinum at umsita og fíggja. Hetta skrivar Vinnuhúsið á heimasíðuni www.indursty.fo

Fyri vanliga løntakaran kann skipanin óiva gerast útreiðsluneutral, væl at merkja, um løgtingið ikki broytir uppskotið. Fyri vinnuna er støðan ein onnur. Ein lækkan í partafelagsskattinum merkir ikki, at vinnan sleppur undan eykaútreiðslum. Broytingin rakar í besta lagi misjavnt, og hetta verður steinur oman á byrðu hjá vinnugreinum, sum frammanundan eru illa sperdar. At landsstýrið ætlar at lækka partafelagsskattin hjálpir ikki okkara høvuðsvinnu, sum er sera lønartung. Verður støði tikið í einum virki sum Kósini, so vóru lønarútgjaldinarnar í 2004 góðar 40 milliónir krónur. Metast kann at gjaldið til Barsilsskipanina hækkar úr 0,25% til 0.6%. Tá fær eitt slíkt fiskavirki eina meirútreiðslu upp á 140.000 krónur. Úrslitið hjá Kósini, eins og hjá fleiri av fiskavirkjunum var í 2004 soleiðis, at ongin skattur varð goldin. Tað vil siga, at lovaða lækkingin í skattinum, kemur ikki hesum virkjum til góðar. Talan er um eina reina meirútreiðslu.

– Landsstýrið hevur tosað nógv um, at karmarnir fyri vinnuna skulu gerast betur. Vit skulu jú verða millum heimsins fremstu tjóðir í 2015. Arbeiðsgevarafelagið hevur ofta víst á, at støðugir karmar eru ein fyritreyt fyri vinnuna. Tað er tí at harmast um, at slíkar avgerðir vera tiknar í skundi uttan umhugsan og uttan at arbeiðsmarknaðurin er eftirspurdur. Hetta er bert enn eitt haft um tað sokallaða eina beinið, vit hava at standa á, heldur Føroya Arbeiðsgevarafelag.





"Det er fedt, at du i tre måneder kan koncentrere dig 100% om dit arbejde og så bagefter har tre måneder, hvor du har fri."

*Jonathan, skibsofficersstuderende*

Du er klar til en uddannelse, der udfordrer både dine boglige og tekniske færdigheder. Som hurtigt giver dig muligheden for at prøve kræfter med dit fremtidige job i en af verdens største handelsflåder. Og som kræver, at du kan fastholde det store overblik såvel som fokus på detaljen.

Læs meget mere om uddannelsen og jobbet på **maersk-skibsofficer.dk**, hvor du også kan bestille informationsmateriale og ansøgningsskema samt sende din ansøgning online. Kommer du i betragtning, modtager du herefter indkaldelse til en optagelsesprøve. Du kan også ringe til os på **+45 3398 7000**.

Gør tanke til handling allerede i dag!

**Vi afholder optagelsesprøve den 3. november 2005 i Thorshavn.**

MÆRSK

maersk-skibsofficer.dk